# Røður, sangur og tónleikur



**Væl av fólki var samankomið í miðbýnum seinnapartin leygardagin at lýða á talur, sang og tónleik, tá ið ANSO skipaði fyri almennum tiltaki**

TILTAK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinnapartin leygardagin skipaði felagsskapurin, ANSO, fyri tiltaki niðan fyri Tinghúsið í Havn, har talur vórðu hildnar, Havnarkórið sang og tónleikararnir, Jens Marni Hansen og Hanus Johansen, sungu og spældu.

Skipað varð eisini fyri skrúgongu gjøgnum býin.

Talarar á tiltakinum vóru Sonja Jógvansdóttir, sum umboðaði Friðarbogan og síðan løgtingsmenninir, John Johannesen og Finnur Helmsdal.

Væl av fólki var samankomið í miðbýnum fyri at lýða á talur, sang og tónleik.

Fyrsti parturin av tiltakinum, sum byrjaði klokkan 14, varð hildin í góðum veðri, men sum løtan leið, fór at smáregna.

Sum skilst, hevði Havnarkórið boðið sær at taka lut í tiltakinum hjá ANSO, sum stendur fyri Assosiation of Nordic Lesbian, Gay, Bisexual and Transgendered Student Organisation.

Í farnu viku skipaði ANSO fyri stórari ráðstevnu fyri samkynd í Norðurlandahúsinum.

Á hesum báðum síðunum prenta vit røðurnar, sum løgtingsmenninir, John Johannesen og Finnur Helmsdal hildu í samband við tiltakið.

# Politikarar eiga at slóða fyri

**Finnur Helmsdal**

Eg ætli mær ikki at sleingja um meg við skriftstøðum í røðu míni ídag, tí eg haldi tað ikki vera viðkomandi, og so kenni eg meg heldur ikki føran fyri tí.

Eg ætli mær heldur ikki at vassa út í djúpar grundgevingar fyri, at rættvísgera tað, at samkynd eiga at hava somu rættindi, sum aðrir føroyingar. Hetta tí, eg haldi ikki tað vera neyðugt at grundgeva fyri nøkrum, sum er so sjálvsagt.

Eg standi heldur ikki á hesum røðarapalli ídag, tí eg haldi samkyntleika ella homoseksualitet vera so øgiliga spennandi og serstakan. Eg haldi heldur ikki, at tey samkyntu eru serliga spennandi og serstøk. Tey munnu vera sum fólk flest. Við sínum styrkjum og veikleikum, við sínari sjarmu og lyndi annars. Tey eru fólk sum eta, arbeiða og sova. Tey hava hug at vera saman við øðrum, hava hava hug at fara í song við øðrum o.s.fr.

Orsøkin til, at eg allíka væl standi her og tosi í dag, er støðan hjá teimum samkyntu í Føroyum. Støðan, tey samkyntu eru í, er nevniliga sera áhugaverd og serstøk. Ja, kanska kunnu vit leggja afturat, at hon er ikki rættiliga sum hjá øðrum føroyingum. Um nakar hevur verið í iva, um hvør støðan er hjá samkyndum føroyingum, so hava hesi í ríkiligan mun fingið staðfest seinastu dagarnar, at tað finnast føroyingar, enn tá innan okkara politisku skipan, sum síggja samkynt sum rættsleysar annan- ella triðjarangsborgarar. Hesum fari eg staðiliga at taka fjarstøðu frá, og eg fari at loyva mær at átala teir politisku starvsfelagarnar, sum hava gjørt okkum øllum so dyggiliga til skammar seinastu dagarnar.

Tað, sum eg ætli at siga nakað um í dag er, hvussu eg sjálvur síggi tey samkyndu, og hvussu eg haldi støða teirra eigur at verða í samfelagi okkara. Í samband við, at flokkurin varð biðin um at flyta røðu á Vaglinum ídag, tosaði eg við umboð fyri Bogan, felagsskapur teirra samkyntu lesandi. Viðkomandi segði, at vit kundu tosa um tað, vit sjálvi hildu vera viðkomandi, men ynskti, at vit eisini tosaðu um støðuna hjá ungum lesandi føroyingum, sum eru samkyntir. Og hon helt fram: Vit halda okkum hava nakað at geva føroyska samfelagnum, av fakligum og menniskjaligum virðum. Hetta vilja vit sleppa at geva. Vit vilja sleppa at liva í Føroyum, vit vilja sleppa at liva soleiðis, sum vit vilja. Nevniliga liva kærleikan fult út, vera glað og lukkulig, uppliva allar lívsins lutir saman við teimum, sum eru okkum kær. Vit vilja, at ung samkynd kunnu vera verandi í Føroyum. Vit vilja, at tey skulu kunna koma heim aftur eftir loknan lestur.

Tá ein hugsar seg um, ja, so er hetta ikki annað enn tað, ein hvør annar føroyingur ynskir sær. Hetta er ikki annað enn tað, ein hvør annar føroyingur sær sum sjálvfylgju og sum minsta mark fyri einum liviligum lívi. Ella sagt á annan hátt, tey menniskju, sum ikki fáa nevndu ynski uppfylt, ja, tey hava ikki lut í grundleggjandi mannarættindum. Tey eru statsleys, tey mugu liva sítt lív fult út aðrastaðni. Tey mugu søkja sær eydnuríka lívið aðrastaðni. Tey eru noydd til at geva øðrum londum tað, sum tey so fegin vildu givið Føroyum og føroyingum. Treytin fyri at tey skulu liva í Føroyum er, at tey leggja seksuellu trongdina undir vaðingina, ella fremja hana í verki í skýmaskotum, ella at tey bara fara í song við sær sjálvum.

Hví gera vit so stórt hóvasták burturúr, at ein so lítil partur av okkara fólki ikki sleppur at liva sum onnur. Er tað alt stríðið og keglið vert, at býta tjóðina sundur millum tey, sum vilja geva teimum samkyndu sjálvsøgd rættindi, og so tey, sum halda at tað skulu vit ikki gera? Sjálvur haldi eg, tað er stríðið og keglið vert.. Vit eiga ikki at góðtaka, at ávís fólk, sum so ella so kenna seg hava ognarrætt til og kenna uppskriftina upp á tað góða lívið, tann rætta moralin, skulu sleppa at reka onnur av landinum. Vit liva í 2005, og skal tað vera ein sjálvfylgja, at Føroyska samfelagið er fyri øll. Øll eiga, óansæð húðalit, átrúnað, seksualitet o.a. óskerdan rætt til øll samfelagsins tilboð, til øll samfelagsins rættindi og sjálvandi eisini til allar samfelagsins skyldur. Vit siga okkum vera humanistar, men tað eru vit ikki, um vit ikki hava pláss fyri øllum upp á somu treytir. Vit hoyra mangan, at føroyingar eru tollyntir, men tað eru vit ikki, um vit ikki góðtaka, at fólk eru øðrvísi.

Tað kann ikki vera rætt, at vit eina løtu siga, at vit halda tað er í lagi, at fólk eru samkynd. Tú hoyrir so mangan fólk siga, at tey blanda seg ikki uppí, hvør liggur undir dýnuni hjá hvørjum. Men tá tað so kemur til at geva somu fólkum full samfelagslig rættindi, tá er hugburðurin brádliga broyttur. Er tað rætt, og kunnu vit loyva okkum, at siga, at nakrir føroyingar skulu hava full rættindi, meðan onnur bert skulu hava hálv ella tríkvart rættindi?

Eg segði at byrja við, at eg helt ikki homoseksualitet í sær sjálvum vera so serstakt, og ein kann spyrja hví so gera tað so serstakt við at røða á Vaglinum og á annan hátt. Ein kann spyrja, hví ikki bara geva evninum frið, hví ikki tiga tað burtur. Svarið til hetta er, at tað helst er neyðugt at viðgera homoseksualitetin sum nakað serstakt, inntil hann ikki er serstakur longur. Inn til eingin føroyingur, ella teir fægstu, yvir høvur geva tí gætur, at nøkur okkara millum eru samkynt. Inn til vit als ikki tosa um fólk ella bólkar sum samkynd ella nakað annað, men bara kalla fólk við teirra kristna navni.

Tað er lætt hjá mær og øðrum at standa á Vaglinum og siga okkum vera tollyntar humanistar, sum ikki kenna minsta vet av trega, tá tað um rættindi til samkynd og onnur ræður. Eg standi her sum politikari, men eg standi sanniliga eisini her sum menniskja og føroyskur borgari. Skal ein skilja ímillum, hvat ein sigur sum politikari, og hvat ein sigur sum menniskja. So ella so mugu orðini umboða báðar partar. Tað ber ikki til, at eg sigi nakað sum politikari, men ikki meini tað sum menniskja. Í so máta eru krøvini til mín júst tey somu, sum til onnur, sum eg sigi skulu sýna tollynta humanismu. Og eg skal opið og erliga siga, at eg havi havt lætt við at taka undir við flestu ynskjunum frá teimum samkyndu, meðan onnur ynski hava staðið sína roynd bæði í høvdinum á mær, í sál míni og búkinum eisini. Tað snýr seg um etisk mørk, um hvussu eg vanliga hugsi og um hvat dirvi, eg veruliga havi. Men eg komi altíð til ta niðurstøðu, at samfelagið er fyri øll. Og tað merkir, at øll skulu liva eitt liviligt lív, við møguleikum fyri at liva saman við sínum, sum ein verulig familja, við børnum, arbeiði, húsi, bili og so framvegis. Og tað merkir, tá skalið er flust av bananini, at vit ikki kunnu loyva okkum at standa og sensurera, tá tað eru samkynt, sum biðja um sjálvsøgd rættindi.

Hvat er so, sum forðar samkyndum føroyingum at liva eitt gott lív her á landi? Jú, tað eru ávísar týdningarmiklar løgfrøðisligar forðingar, og so er tað hugburðurin hjá tær og mær.

Taka vit løgfrøðisligu forðingarnar fyrst, so eru tað møguleikarnir fyri skrásettum parlagi, sum hevur fingið mestu umrøðuna. At tveir samkyndir persónar ganga í skrásett parlag merkir einfalt, at teir kunnu giftast upp á sama máta, sum onnur. Her verður ikki hugsað um, hvar ein verður giftur men um, hvat tað merkir løgfrøðisliga at tveir samkyntir persónar verða giftir. Nú kunnu samkynt als ikki giftast her á landi, og kunnu tey tí heldur ikki ganga saman í skrásett parlag. Hetta merkir, at at samkynt ikki hava somu rættindi, hvat viðvíkur arvi ella á annan hátt, um tey velja at fara hvør til sítt.

Nú tosi eg ikki vegna ein samlaðan flokk, men sjálvur eri eg ikki eina løtu í iva um, at vit eiga at geva samkyndum lógartryggjaðan rætt at ganga saman í skrásett parlag her á landi. Tað kann ikki vera rætt, at vit reka fólk til onnur lond at